KÍ-VB 0-0:

KÍ og stólparnir vóru ikki í parti

Eftir stóra yvirvág og tvær royndir í stólparnar dovnaði KÍ í 2. hálvleiki, tá VB í italskum stíli megnaði at taka alla ferðina úr spælinum og tryggja sær málleysan javnleik

KÍ–VB
Jóannes Hansen

Klaksvíkingar tevjaðu toppin sunnudagin. Tað sást eisini á áskoðarafjøldini, sum í góðveðrinum var størri, enn hon hevur verið higartil í ár. Áskoðararnir vóru sjáldsama friðarligir. Tað var ikki fyrrenn síðstu løtuna, tá síðsta ikki serliga sannførandi royndin varð gjørd at fáa málið, sum hevði verið so sera týdningarmikið, varð gjørd, at fjøldin kring vøllin fór at róra á sær, men tað hjálpti ikki.

KÍ og KÍ viðhaldsfólkini fóru vónbrotin til hús aftur. Eftir risastóra leikliga yvirvág í fyrra umfarinum og onkrar upplagdar møguleikar, var seinna umfarið rættuliga tannleyst. Tað eydnaðist ikki heimaliðnum at spæla seg til upplagdar málmøguleikar. Og sum umfarið leið, og strongdin á heimaliðnum gjørdist størri, spøkti møguleikin, at tað í onkrum hissini mótálopi skuldi eydnast VB at fáa málið, sum teir á ongan hátt høvdu spæl og møguleikar til. Í veruleikanum var tað soleiðis, at KÍ málverjin, Meinhardt Joensen, bara eina ferð bjargaði. Tað var miðskeiðis í 2. hálvleiki, tá spælandi VB venjarin, Marek Wierczbicki, sendi spakuligt frískpark flatt framvið manngarðinum.

Marek var í 2. hálvleiki ofta miðdepul, tá VB royndi at verja. Marek hevur ongantíð verið tann, sum hevur ofrað seg í nærdystunum, og tað var hann heldur ikki hesa ferð. Men hann megnaði saman við hinum VB spælarunum í 2. hálvleiki viðhvørt at varðveita bóltin og smáspæla, og tað hevði stóran týdning. Saman við tíðarspilluni, tá málspørk og innkøst skuldu takast, og tá vágbingarnir lógu meiri ella minni skaddir á vøllinum, var hetta við til at ørkymla teir á heimaliðnum.

Betra umfarið

Í 1. hálvleiki megnaði KÍ fleiri ferðir at spæla seg til møguleikar, eftir at uppspælið í borðunum hevði verið gott. Serliga í høgra borði gekk nógv fyri seg. Vágbingar høvdu lit við at tippa í hesum borðinum, og Harley Bertholdsen var aftur hesa ferð sera væl upplagdur. Hann kom fleiri ferðir til baklinjuna, men innleggini vóru ofta ikki nóg neyv. Tað tóktist sum um, at tað frammanundan ikki var avgjørt, um bóltarnir skuldu leggjast til nærra ella handara stólpan. Tí varð ofta talan um meiri ella minni jánkasligar millumloysnir, sum óføra røsku tvíburðarnir í VB miðverjuni saman við málverjanum fingu vart fyri.

Kortini hevði KÍ í hesum umfarinum møguleikarnar, sum áttu at borið mál við sær og harvið aðrar fyritreytir fyri seinna umfarinum.

Størstu møguleikarnar fingu Harley Bertholdsen og Bárður á Lakjuni. Tann fyrri fekk púra óneyðugt bóltin fyri føturnar heilt í høgru og miðskeiðis á VB helvtini, tá vágbingar vóru á veg fram. Harley sneiddi framvið trimum, og tá hann kom á málteigarsamankomingina, smekkaði hann til, men bólturin brast í stólpan, meðan Kurt Mørkøre, sum var púra leysur mitt fyri málinum, hugdi at.

Bárður á Lakjuni hevði havt sín møguleika frammanundan. Kurt Mørkøre snittaði við høvdinum frísparksinnlegg frá Jan Andreasen til álopsfelagan, og eitt sindur kroysti Bárður á Lakjuni megnaði akkurát at lyfta upp um Bjarna Johansen, men ólukkutið fyri spentu klaksvíkingarnar stiklaði bólturin í stólpan, áðrenn verjan beindi hann av vegnum.

Ússaligara umfarið

Sum seinna umfarið leið strongdust heimamenninir alt meiri. Vágbingar syrgdu fyri, at ferðin ikki fór upp, og tað kendist sum um KÍ spælararnir ikki megnaðu at seta ferð á. Í hvussu so er bilaði tað við skjótu síðuskiftunum, sum høvdu verið sera kærkomin, tí VB flutti sítt lið so langt út í síðurnar. Tað varð roynt at fáa Hjalgrím Elttør til baklinjuna í vinstru, men tað eydnaðist ongantíð at fáa innleggini í brotsteigin, sum kundu verið lunnar undir royndum ímóti málinum.

Tað stóð oftani nógv á, men vágbingar fingu strítt seg til javnleik í Klaksvík, og komu harvið eitt stig burtur úr kreppuni

Mynd: SáH

Í kapprenningini við klokkuna varð Allan Mørkøre settur á vøllin, men hann tóktist ikki at vera serliga væl fyri. Ove Nysted varð fluttur í álopið, tá vágbingar tíggju minuttir undan leikloki mistu ein mann, men líka lítið hjálpti.

Aleksander Djordjevic spældi í miðverjuni við stórum sjálvsáliti. Tá havt verður í huga, at Allan Joensen var raskur vegna kendur miðvallari hevði tað kanska verið eina royndvert hjá KÍ at flutt jugoslavan, sum í fjør kom til KÍ sum álopsspælari, í álopið, ella kanska at flutt skjóta Hjalgrím Elttør longri fram á vøllin. Undir øllum umstøðum restaði tað ferð og dynamikkur í 2. hálvleiki. Tvær ferðir noyddist Bjarni Johansen at bjarga skotroyndum, og einar fimm ferðir ruddaði hann eftir horasparksstøður.

Tað var væl skiljandi, at vágbingar vóru hjartans fegnir um javnleikin, og at klaksvíkingar hingu við høvdinum.

Dysturin í tølum:

KÍ-VB 0-0
Dómari: Oddmar Andreasen

KÍ: Meinhardt Joensen – Jan Andreasen, Ove Nysted, Aleksander Djordjevic, Rúni Elttør – Harley Bertholdsen, Jan Joensen, Allan Joensen, Hjalgrím Elttør – Kurt Mørkøre, Bárður á Lakjuni
VB: Bjarni Johansen – Magni Jacobsen, Eyðun Jacobsen, Slobodan Madzar – Palli Augustinussen, Marek Wierzbicki, Jón Gærdbo, Mikael í Lágabø, Mortan úr Hørg – Dan Djurhuus, Nenad Zivanovic

Bókhaldið kiksaði

Tað var um reppið, at Slobodan Madzar helt fram at spæla, eftir at hann hevði fingið seinna gula kortið

KORTSPÆL
Jóannes Hansen

Tað kom eitt sindur av óskili í bókhaldið hjá dómaranum í Klaksvík sunnudagin. Tá tað restaðu fimm minuttir av vanligu leiktíðini fekk ein av hollu miðverjunum hjá VB, Slobodan Madzar, gula kortið fyri aðru ferð. Hann sá gult fyri at taka beinini undan Allani Joensen, sum við stórari ferð var farin framvið honum.

Eftir at dómarin hevði víst gula kortið og tikið sær góða tíð at útinna skriviarbeiðið, tóktist tað, sum um ætlanin var at taka spælið uppaftur. Jugoslaviski miðverjin var farin aftur í brotsteigin, meðan Oddmar Andreasen stóð eitt sindur frammanfyri miðstrikuna saman við fleiri KÍ spælarum. KÍ liðformaðurin, Jan Joensen, og Aleksander Djordjevic, sum er landsmaður hjá Slobodan Madzar, høvdu støðugt tveir fingrar á lofti. Teir royndu at kunna dómaran um, at nú hevði jugoslaviski verjuspælarin hjá VB sæð gult tvær ferðir, og at hann tískil átti av vøllinum. Men tað gekk ein løta, áðrenn dómarin gav teimum rætt og fór í reyvalumman.

Frágreiðingin kom eftir dystin. Dómarin, sum annars ikki á nakran hátt var í brennideplinum (tað boðar frá góðum dómaraavriki), hevði í fyrra førinum, tá Madzar fekk gula kortið, ikki vera nóg ansin. Í staðin fyri at skriva nummar sjey hjá VB fyri gula kortið, hevði hann skrivað ein klaksvíking fyri kortið (eingin var nummar sjey hjá teimum).

Linjuverjin í tí borðinum, har Madzar var staddur, tá hann í 1. hálvleiki fekk fyrra gula kortið, hevði flaggið á lofti, so VB verjuspælarin hevði neyvan sloppið at hildið fram á vøllinum, sjálvt um klaksvíkingar ikki høvdu minst so væl, sum teir gjørdu.

Merkisvert var tað, at tríggir spælarar fingu gult kort, og allir vóru úr Jugoslavia. Umframt Slobodan Madzar fekk Nenad Zivanovic hjá VB gult kort. Hjá KÍ var tað Aleksander Djordjevic, sum sá gult.

Klaksvíkingar hava annars ikki fingið nógv kort í landskappingini í ár. Í átta dystum hava teir sæð gula kortið níggju ferðir. Tað er bara Jan Joensen, sum er á markinum til leikbann. Hann hevur fingið tvey gul kort.

Vágbingar hava fingið ellivu gul kort og tvey reyð. Umframt reyða kortið, sum Madzar fekk í Klaksvík, er Mortan úr Hørg eisini vístur av vøllinum.

B36-GÍ 2-3 (1-1):

Nú kemur GÍ

Gøtumenn komu loksins í gongd, tá teir vitjaðu hjá B36. Talan var ikki um nakran vakran fótbóltsdyst, men eyðkendi stríðsviljin hjá GÍ var til staðar, og tá eru teir vandamiklir hjá øllum liðum

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Úrslitini hjá GÍ hetta kappingarárið kunnu als ikki sammetast við tey, sum liðið vanliga fær, og hetta kundi eisini lesast av stigatalvuni undan dystinum móti B36.

B36 hevur tó heldur ikki fingið nær námind so nógv burtur úr árinum, sum teir høvdu ætlað sær, og serstakliga hevur tað kiksað á heimavølli, so tað vóru í øllum førum útlit fyri einum spennandi dysti, har hvørgin parturi hevði ráð at missa eitt einasta fet, tá liðini brustu saman sunnudagin.

Ein avleiðing var so, at skipaða spælið á miðvøllinum var mest sum burtur, tí hesin oftani varð lopin um, og tá bólturin var á miðjuni, var talan oftani um harðar nærdystir um bóltar, sum vóru stútaðir út frá aftur verjunum.

Fyri at fáa sum mest burturúr tilvildarligu møguleikunum, sum ofta ikoma, tá spælt verður soleiðis, høvdu venjararnir báðir eisini umskipað liðini nakað. GÍ hevði sum bert Súna Fríða einsamallan á toppinum, men Magna og Zdzislaw sum sera álopssinnaðar miðvalarar, og hjá B36 vóru John Petersen og Jákup á Borg aftur settir saman í álopinum, eftir at teir annars upp á skift hava verið á miðvøllinum seinastu dystirnar.

Og tað eydnaðist eisini báðum pørtum at fáa nakrar vandafullar møguleikar, tó at hesir í flestu førum komu eftir hildur tilvildarligar støðu. René Tórgarð stórbjargaði tó, tá Súni Olsen tíðliga í dystinum slapp at royna seg eftir klumpspæl, og Hvørki Magni á Lakuni ella Jákup á Borg megnaðu at skora, eftir at teir gjørdist leysir, tá langir bóltar vóru sendir inn um gøtuverjuna.

Við sigrinum sunnudagin otaði GÍ seg eitt stórt fet nærri oddinum, so gleðin á Bartali og Súna Fríði eftir seinasta málið er skillig

Mynd: Álvur Haraldsen

Miðvøllurin lopin um

At hvørgin parturin hevði ráð at missa, merkti kanska eisini spælið eitt sindur fyrstu tíðina. Hvørgin av verjunum hevur verið eins trygg og vanligt higartil í ár, og tí tóktist sjálv spælilætlanin hjá liðunum eisini at vera púrasta greið. Tað ráddi um skjótt at flyta bóltin niðan, soleiðis at møguleikarnir fyri kostnaðarmiklum mistøkum var burtur, og so royna at skapa okkurt, tá bólturin var komin niðan.

Ein av fleiri ferðir at spæla seg til møguleikar, eftir at uppspælið í borðunum hevði verið gott. Serliga í høgra borði gekk nógv fyri seg. Vágbingar høvdu lit við at tippa í hesum borðinum, og Harley Bertholdsen var aftur hesa ferð sera væl upplagdur. Hann kom fleiri ferðir til baklinjuna, men innleggini vóru ofta ikki nóg neyv. Tað tóktist sum um, at tað frammanundan ikki var avgjørt, um bóltarnir skuldu leggjast til nærra ella handara stólpan. Tí varð ofta talan um meiri ella minni jánkasligar millumloysnir, sum óføra røsku tvíburðarnir í VB miðverjuni saman við málverjanum fingu vart fyri.

Kortini hevði KÍ í hesum umfarinum møguleikarnar, sum áttu at borið mál við sær og harvið aðrar fyritreytir fyri seinna umfarinum.

Størstu møguleikarnar fingu Harley Bertholdsen og Bárður á Lakjuni. Tann fyrri fekk púra óneyðugt bóltin fyri føturnar heilt í høgru og miðskeiðis á VB helvtini, tá vágbingar vóru á veg fram. Harley sneiddi framvið trimum, og tá hann kom á málteigarsamankomingina, smekkaði hann til, men bólturin brast í stólpan, meðan Kurt Mørkøre, sum var púra leysur mitt fyri málinum, hugdi at.

Bárður á Lakjuni hevði havt sín møguleika frammanundan. Kurt Mørkøre snittaði við høvdinum frísparksinnlegg frá Jan Andreasen til álopsfelagan, og eitt sindur kroysti Bárður á Lakjuni megnaði akkurát at lyfta upp um Bjarna Johansen, men ólukkutið fyri spentu klaksvíkingarnar stiklaði bólturin í stólpan, áðrenn verjan beindi hann av vegnum.

Ússaligara umfarið

Sum seinna umfarið leið strongdust heimamenninir alt meiri. Vágbingar syrgdu fyri, at ferðin ikki fór upp, og tað kendist sum um KÍ spælararnir ikki megnaðu at seta ferð á. Í hvussu so er bilaði tað við skjótu síðuskiftunum, sum høvdu verið sera kærkomin, tí VB flutti sítt lið so langt út í síðurnar. Tað varð roynt at fáa Hjalgrím Elttør til baklinjuna í vinstru, men tað eydnaðist ongantíð at fáa innleggini í brotsteigin, sum kundu verið lunnar undir royndum ímóti málinum.

Í kapprenningini við klokkuna varð Allan Mørkøre settur á vøllin, men hann tóktist ikki at vera serliga væl fyri. Ove Nysted varð fluttur í álopið, tá vágbingar tíggju minuttir undan leikloki mistu ein mann, men líka lítið hjálpti.

Aleksander Djordjevic spældi í miðverjuni við stórum sjálvsáliti. Tá havt verður í huga, at Allan Joensen var raskur vegna kendur miðvallari hevði tað kanska verið eina royndvert hjá KÍ at flutt jugoslavan, sum í fjør kom til KÍ sum álopsspælari, í álopið, ella kanska at flutt skjóta Hjalgrím Elttør longri fram á vøllin. Undir øllum umstøðum restaði tað ferð og dynamikkur í 2. hálvleiki. Tvær ferðir noyddist Bjarni Johansen at bjarga skotroyndum, og einar fimm ferðir ruddaði hann eftir horasparksstøður.

Tað var væl skiljandi, at vágbingar vóru hjartans fegnir um javnleikin, og at klaksvíkingar hingu við høvdinum.

Dysturin í tølum:

B36-GÍ 2-3 (1-1)
1-0: Jens Kristian Hansen, 34
1-1: Magni Jarnskor, 42
2-1: Magni á Lakjuni, 49
2-2: Súni Fríði Johannesen, 54
2-3: Hans Pauli Petersen, 94
Dómari: Jens Petur Brattalíð. Hevði generelt eina ov veika linju, soleiðis at spælið útviklaði seg til at gerast alt ov hart. Men tað skal tó leggjast afturat, at dómarin fekk millum lítla og onga hjálp frá hjálpardómarunum, sum valla hugdu eftir øðrum enn rangstøðu og innkasti.

B36: René Tórgarð - Arnbjørn Danielsen, Egil Zachariasen, Jens Kristian Hansen – Bárður Mortansson, Kenneth Jacobsen, Din Sandu, Klæmint Matras, Magni á Lakjuni – John Petersen, Jákup á Borg
GÍ: Hallur Hansen – Hans Pauli Petersen, Bartal Eliasen, Pól Ennigarð, Leivur Hansen – Jóan Pauli Olsen, Sámal Joensen, Súni Olsen – Magni Jarnskor, Súni Fríði Johannesen, Zdzislaw Janik

Óhóskandi fyri børn. Í fleiri førum var talan um atburð, sum als ikki hoyrir heima á einum fótbóltsvølli. Her eru Súni Olsen og Jákup á Borg um at koma í bardaga

Mynd: Álvur Haraldsen

Gøtumenn javnaðu tó stutt eftir, tá Súni Olsen sendi frískpark innfyri. Bólturin datt fyrst niður til Súna Fríða, sum sera hegnisliga tamdi til Magni, sum úr stuttari fjarstøðu potaði bóltin inn um vinstra stólpa.

Stutt eftir steðgin var tað B36, sum átti tørn at skora eftir frískpark. Johan Nielsen man tó vera alt annað enn nødgur um, at leikarar hansara snorksvóvu, tá Klæmint Matras vann frískpark á miðvøllinum. Kenneth Jacobsen var skjótur at senda Bárð Mortansson avstað, og áðrenn gøtumenn reiðuliga høvdu fatað, hvat gekk fyri seg, hevði vongvergin sent innfyri, har Magni á Lakjuni var fyrri enn Hallur á føturnar hjá Jens Kristiani Hansen, sum smekkaði til uttan nakran møguleika hjá málverjanum at verja fyri.

Dýrir deyðbóltar

Sum dysturin gekk, so var tað eisini ógvuliga sigandi, at av teimum fimm málunum, komu fýra eftir deyðbóltsstøður.

B36 fekk lagt seg á odda, eftir at teir tíggju minuttir fyri hálvleik høvdu eitt av fleiri hornaspørkum. Eftir eitt sindur av aftur og fram datt bólturin niður fyri bóltinum.

Men hvørgin parturin tóktist hava lært nakað av øllum hesum deyðbóltsstøðunum. Lítla løtu seinni sendi Súni aftur frískpark innfyri. Hesa ferð var Súni Fríði púrasta ódekkaður, og stutt undir málinum kundi hann stýra bóltinum inn, og so stóð aftur á jøvnum.

Ófantaligt

Um hetta mundi var dysturin eisini um at broyta skap. Sum sagt, so hevði talan verið um nógvar og harðar nærdystir, og til tíðir høvdu fleiri av leikarunum flutt seg langt út um tað markið, sum vanliga verður sett, soleiðis at talan í nógvum førum gjørdist um støður, sum rætt og slætt vóru óhóskandi fyri børn.

Hevnisøkurnar á vøllinum vóru nógvar í tali, og við eini harðari linju í dømingini hevði talan helst verið um fleiri kort. Til tíðir var um reppið, at talan gjørdist um veruligan bardaga á vøllinum, og einu ferðina var B36-formaðurin enntá úti á vøllinum at skilja menn sundur.

Og so hendi tað, sum øll mest sum bíðaðu eftir, nevnliga at reyða kortið varð givið onkrum leikara. Orsøkirnar til at geva reytt kort, høvdu longu verið fleiri, men tá Jákup á Borg beint framman fyri dómaranum hevndi seg inn á Magna Jarnskor fyri atgerðir, sum hesin hevði framt, kundi dómarin illa gera annað enn fara í reyvalumman eftir ostaskorpuni. At einir fýrafimm B36-leikarar royndu at mótmæla hesum var sjálvandi nyttuleyst, og dómurin stóð við.

Við ellivu móti tíggju styrknaðu fortreytirnar hjá B36 fyri at fáa meira enn javnleikin burturúr. Hóast B36 kanska hevði vandamestu royndina at leggja seg á odda, tá John fluktaði á samankomningina, so mundu tað hóast alt vera gøtumenn, sum høvdu flestu álopini í seinna hálvleiki, og seinastu løtuna royndu teir at trýsta fyri at tvinga eina avgerð av dystinum fram.

Og hetta eydnaðist eisini í evstu løtu. Hjálpardómarin vísti, at fýra minuttir vórðu lagdir afturat vanligu tíðini, og hesir pluss tíggju sekund vóru farin, tá GÍ loksins skoraði. Eitt langt álop endaði við innleggi til Bartal Eliasen, sum fekk trýst bóltin fram við bæði verju og málverja, og mest sum á mállinjuni var Hans Pauli Petersen at enda hægstur, soleiðis at hann fekk stútað bóltin í kassan til endaliga úrslitið.

Eru nú væl við

Sum vera man, var frøin á gøtumonnum stór, og úrslitini í hinum dystunum hetta vikuskifti góvu teimum so avgjørt orsøk at gleðast enn meira.

Tapið hjá HB viðførdi, at oddurin ikki fór nakran veg, og nú gøtumenn fingu minkað munin niður í fýra stig, so er kanska als ikki so langt til europeisku plássini, sum tað annars hevur sæð út til.

Tað mundi tó vera ein smeitur, at bæði Magni og Gidek fingu sítt triðja gula kort hetta kappingarárið. Hetta merkir leikbann í komandi dystinum, sum er á Mølini í Eiði, og at hetta ikki er nøkur løtt uppgáva, eru gøtumenn væl kunnaðir um.

B36 misti hinvegin ein gyltan møguleika at leggja seg veruliga út í oddastríðið, og tó at munurin enn bert er fýra stig, so er spurningurin, um B36 ikki longu hevur mist ov nógv. Av teimum 11 stigunum, sum liðið hevur mist í ár, eru tey níggju mist á heimavølli, og sammett við hini oddaliðini er hetta í meira lagi.

At teir so eisini mugu vera Jákup á Borg fyri uttan komandi dystin, sum verður suðuri í Vági, ger neyvan bjartskygni hjá árstalsfelagnum størri.